# Ætlar at byggja stóran granskingardepil í Havn

**Beint eftir ólavsøku fer landsstýrismaðurin í vinnumálum at leggja uppskot fram um at byggja eina stóra miðstøð fyri gransking**

GRANSKING
*Áki Bertholdsen*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur stórar ætlanir á granskingarøkinum í Føroyum og nú ætlar hann, at almennir stovnar og privat virki skulu ganga saman um at gera eina stóra granskingarmiðstøð í Havn*

Gongst sum Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, ætlar, verður ein nýggjur og stórur granskingardepil bygdur í næstum.

Hann sigur, at hetta er eitt mál, hann leggur sera stóran dent á at fremja.

– Eitt tað fyrsta málið, eg fari at reisa í samgonguni eftir ólavsøku, verður at leggja uppskot fram um at byggja eina granskingarmiðstøð.

Hann sigur, at í avtalu við ES hava vit bundið okkum til at gera eina fiskapatologiska starvsstovu í Føroyum, so at vit sjálvi kunnu kanna royndir, vit taka av fiski, eitt nú í sambandi við ILA og aðrar sjúkur, ístaðin fyri at senda alt av landinum, sum vit gera nú.

– Ætlanin var at byggja hana í sambandi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna úti á Debesartrøð. Men hetta er ein stór útbygging og eg haldi at tað er ørskapur at brúka so stórar upphæddir úti á Debesartrøð, har bæði Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Fróðskaparsetrið hava átrokandi tørv á størri hølum.

Tí mælir Bjarni Djurholm heldur til, at vit byggja nýtt.

Hann sigur, at Landsarkitekturin arbeiðir í løtuni við einum tilmæli um, hvat skal gerast, um tað er rættast at byggja upp í úti á Debesartrøð, ella um tað er rættast at byggja nýtt.

Hann fær tilmælið frá Landsarkitektinum í næstum.

### Ein felags pallur fyri gransking

Men sjálvur er hann sannførdur um, at tað er rættast at byggja nýtt.

Og hann hevur stórar hugsjónir, tí tað, hann ætlar, er at byggja ein felags granskingarpall, sum skal fevna um nógvar ymsar tættir.

– Eg hugsi mær ein felags granskingarmiðstøð, har Heilsufrøðiliga Starvsstovan, Apoteksverkið, Heilsuverkið, verða sjóðað sama í einum og sama granskingardepli.

Men harumframt ætlar hann eisini, at aðrir íleggjar skulu koma uppí, so at hesin depilin eisini fer at leggja grundarlagið undir gransking innan biotøkni og arvagransking, so at rættilig gongd eisini kann koma á gransking á teimum økjunum eisini. Eitt nú hugsar hann um Elektron og aðrar teldufyritøkur, umframt fyritøkur og stovnar, ið hava við gransking á ymsum økjum at gera, bæði føroyskar og útlendskar.

– Sostatt er ætlanin at byggja upp eitt granskingarumhvørvið í Føroyum, sum rættiliga kann seta ferð á gransking her á landi.

Hann sigur, at ætlanin, sum so, er ikki at byggja eina nýggjan stovn, men at geva teimum stovnum, sum er, nógv betri umstøður.

– Talan verður ikki um at seta fleiri fólk- uttan so at talan verður um at seta útlendskar granskarar í starv, tí tað verður tað uttan iva talan um.

### Byggjast í Havn

Tað er ongin ivi um, at tað verður stór ósemja um, hvar í landinum, ein slík granskingarmiðstøð skal vera.

Og tað váttar landsstýrismaðurin í vinnumálum eisini, tí tað hevur hann longu fingið staðfest at so er.

– Hetta er eitt mál, vit í Vinnumálaráðnum hava arbeitt við í tvey ár saman við Heilsumálráðnum, men tað kom stígur í, tí at ósemja tók seg upp, hvar ein slík miðstøð skulu vera, tí onkur vildi hava, at støðin skuldi byggjast onkra aðrastaðni, enn í Havn

Sjálvur er Bjarni Djurholm sannførdur um, at ein slík granskingarmiðstøð má vera í Havn.

– Tað verða starvsfólk á Landssjúkrahúsinum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum verða mergurin og ryggurin í hesi granskingarmiðstøðini. So antin byggja vit hana í Havn, ella mugu vit flyta starvsfólk av Landssjúkrahúsinum og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, út á bygd og tað letur seg ikki gera.

### Kostar 50 milliónir

Bjarni Djurholm sigur, eitt bygningurin til eina slíka miðstøð kostar einar 50-55 milliónir. Men harumframt kemur so allur tann tekniski útbúnaðurin, sum eisini er rættiliga dýrur.

– Tað, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tørv á, kostar áleið fimm milliónir. Men koma vit hartil, at framkomin gransking innan biotøkni og arvagranskingtekur seg upp, verður talan um heilt aðrar upphæddir, sum krevjast til tekniskan útbúnað.

## Ein hornasteinur í búskapinum

At byggja ein felags granskingarpall, sum er umrøddur í aðrari grein her á síðuni, var eitt mál, sum varð umrøtt, tá ið samgongan varð skipað eftir valið nú 30. apríl

Har er spurningurin um gransking umrøddur og tað er ikki hissini ætlanir, samgongan hevur á hesum øki.

Í samgonguskjalinum stendur einki minni enn, at »miðast skal eftir, at kunningartøkni, bio- og gengransking verða hornasteinar í búskapinum, har samanrenning ímillum vitan, samskifti og kunningartøkni verður ásin, sum framburðurin á økinum melur um.

Kreativar vinnur skulu mennast.

Byggjast skal starvsstova, har sjúkrahús, apotek, Heilsufrøðisliga Starvstovan, Elektron, aðrar teldu-fyritøkur og privatir íleggjarar samstarva á felags palli innan gengransking, lívfrøði og evnafrøði«.

# Danskt gentukór konsert í kirkjuni í Hvalba í kvøld

**– Kórið fer at syngja nýtt og gamalt og gamalt í nýggjum sniði á konsert í Hvalbiar kirkju í kvøld**

KIRKJUKONSERT
*Áki Bertholdsen*



*Stóra gentukórið í Fredens Kirke í Herning fer at hava eina konsert í Suðuroy, og hon verður í Hvalbiar kirkju í kvøld*

Í kvøld fáa suðuroyingar eitt sjáldsamt høvi at at hoyra konsert í kirkjuni í Hvalba.

Tað er gentukórið í Fredens Kirke í Herning í Danmark, sum er komið á konsertferð í Føroyum og sum fer at halda konsert í Hvalbiar Kirkju í kvøld kl. 19.30.

Í kórinum eru 25 gentur, sum allar ganga í 5. til 8. skúlaflokk, men tilsamans eru 55 fólk í ferðalagnum.

Kórið er uttanlands triðjahvørt ár og í ár gekk so leiðin til Føroya. Tað er kanska ikki heilt av tilvild, tí leiðari hjá kórinum og organistur í Fredens Kirke er Gudmund Mortensen úr Fuglafirði, sum eisini er bróður Jens Mortan Mortensen í Hvalba, sum er organistur í kirkjuni í Hvalba og á Tvøroyri.

Ferðirnar hjá kórinum eru bæði konsert- og frítíðarferðir so tey eru nógvar útferðir, tá ið tey eru í Føroyum. Tey hava verið undir Vestmannabjørgunum og í Sandavági fingu tey eisini grindadráp við.

Tey siga, at ferðin í Føroyum hevur verið frálík.

Danska gentukórið kom til Føroyar fríggjadagin og frammanundan hava tey havt konsert í Sandavági.

Tey skuldu koma til Hvalbiar í gjárkvøldið og konsertin í kvøld er tann einasta á skránni í Suðuroy, tey steðga til hósmorgunin, tá ið tey fara av landinum aftur.

### Fjølbroytt skrá

Skráin hjá kórinum er rættiliga fjølbroytt. Har er bæði nýtt og gamalt og gamalt í nýggjum sniði, bæði klassiskt, sangleikir og gospel.

Eitt nú fara tey at syngja »Harra Gud títt dýra navn og æra« á donskum, men við tí føroyska lagnum, sum er ókent í Danmark, men sum Jens Mortan Mortensen hevur lagt til rættis fyri kórið.

Tey syngja eisini onkur klassisk sálmaløg, eitt nú »Jesu bleibet meine freude« eftir Bach og »Panis Angelikus« sum er eitt kent lag hjá Cesar Franck.

Harumframt fara tey eisini at syngja brot úr einum sangleiki, sum Hans Holm hevur skrivað um Jónas, sum endaði í búkinum á hvalinum , hetta er eitt rytmiskt lag. Uppi í tí rytmiska partinum hoyrir eisini nakrir gospelsangir, sum kórir syngur.

Tey syngja eisini onkrar kendar, danskar og svenskar sálmar, summir av teimum eru við tí gamla lagnum, men í nýggjum sniði,

Eftir konsertina fara kór og áhoyrarar í Missiónshúsið í Hvalba á kvøldsetu.



# So vóru teir aftur her

**Væl pakkaðir í stórar tungar trækistur komu átta av teimum sekstan Kirkjubøstólunum og ein rúgva av øðrum føroyskum forngripum til landið mánamorgunin. Á Forminnissavninum var stórur spenningur á fólki, og tað lætnaði ikki rættiliga, fyrr enn allir forngripirnir vóru tiknir úr flytibyngjuni og settir inn í hitan í hølunum í Brekkutúni**

FORNGRIPIR
*Rúnar Reistrup*



*Kirkjubøstólurin, har Matteus evangelistur er avmyndaður, var tann fyrsti at síggja dagsins ljós aftur í Føroyum eftir 127 ára útlegd*

Einaferð tæntu teir einum praktiskum endamáli, soleiðis at kirkjubømenn sluppu undan at standa uppi ígjøgnum tær langu guðstænasturnar. Men í 1874 vórðu teir tiknir úr kirkjuni, tá hon varð umvæld, og í 1875 vórðu teir fluttir á danska tjóðarsavnið, har teir hava staðið til fyri fimm døgum síðan, tá teir vórðu fluttir umborð á Blik. Í gjár komu Kirkjubøstólarnir saman við einari rúgvu av øðrum virðismiklum forngripum til Føroya, eftir at hava bíðað eftir hóskandi hølum í einogfjøruti ár.

Á keiini heilsaði regnið forngripunum vælkomnum aftur, men annars var ikki nøkur stórfingin vælkoma, tá hvíta bingjan við forngripunum varð sett á land. Tað var heldur ikki fyrr enn ein bilur hjá Skipafelagnum hevði koyrt bingjuna niðan til hølini hjá Føroya Fornminnissavni í Brekkutúni, at flutningsskyldan hjá Skipafelagnum var av, og ábyrgdin av gripunum varð latin Fornminnissavninum.

Árni Joensen stjóri á Skipafelagnum stóð sjálvur á keiini undir lossing og fylgdi bingjuni allan vegin niðan í Brekkutún. Hann var fegin um at flutningurin hevði gingið væl.

- Veðrið var gott allan túrin hjá Bliki, og bingjan stóð væl pakkað millum allar hinar, so har var eingin vandi. Men tað er undir lossing og flutningi á landi, at okkurt skjótt kann ganga galið, so tá var spenningurin størstur, segði Árni Joensen, tá bingjan var tømd í øllum góðum.

Blikur hevur helst ongantíð verið so dýrabært lastaður sum hendan seinasta túrin. Forngripirnir eru tryggjaðir fyri 10 milliónir krónur, men veruliga virðið á lutunum er ómetaligt í orðsins rætta týdningi.

### Fylgdi forngripunum

Við forngripunum umborð á Bliki var Vibe Edinger frá danska tjóðarsavninum. Hon var væl nøgd við flutningin.

- Túrurin var ógvuliga friðarligur, so lutirnir hava havt tað gott, segði Vibe Edinger, sum er ein av teimum, sum hevur pakkað forngripirnar á danska tjóðarsavninum, har teir seinastu mánaðirnar hava staðið frammi á einari sonevndari farvælframsýning.

Tað er ikki hvønn dag, at lutir verða tiknir úr danska tjóðarsavinum, og Vibe Edinger viðgekk, at tað var við blandaðum kenslum at gripirnir vórðu sendir avstað, men hon var sannførd um at teir standa eins væl her landi.

### Stór løta

Á Fornminnissavninum var alt starvsfólkið komið saman at uppliva løtuna, tá forngripirnir komu inn um gáttina í nýggja heimi sínum. Størstur var spenningurin tá ein av kassunum við Kirkjubøstólunum varð latin upp.

- Vit mugu líka kanna um teir hava sent okkum røttu vørurnar, helt Símun, V. Arge, landsantikvarur, skemtandi fyri, tá skrúvurnar á kistulokinum vórðu tiknar úr.

Og so var. Stólurin har Matteus evangelistur er avmyndaður, varð tikin upp úr kassanum, og staðfest varð, at hetta var ein av stólunum, sum fram til 1874 stóð í kirkjuni í Kirkjubø.

Fremstur stóð fyrrverandi landsantikvarur Arne Thorsteinsson, sum frá føroyskari síðu hevur staðið fyri fyrireikingunum undan flutninginum av forngripunum. Hóast hann ikki ivast í forngripavirðinum av Kirkjubøstólunum, so vóru fleiri lutir í trækistunum, sum hann sjálvur hevur størri áhuga fyri. Millum annað eitt gamalt alnarmál, sum er tann einstaki luturin, sum fyrrverandi landsantikvarurin persónliga hevur størstan áhuga fyri.

- Tað løgna er, at meðan føroyingar hava verið ógvuliga upptiknir av at fáa Kirkjubøstólarnar til Føroya, so hevur man als ikki vakt øll hinum dýrabæru føroysku forngripunum á danska tjóðarsavninum ans. Føroyingar hava bara biðið um at fáa Kirkjubøstólarnar aftur, men danir hava spurt, um vit ikki eisini vilja hava allar hinar forngripirnar eisini, helt Arne Thorsteinsson fyri.

### Stólarnir stava ikki úr Føroyum

Kirkjubøstólarnir, sum verða mettir at stava úr 15. øld, eru úr furutræi. Tað er greitt, at teir ikki eru skornir í Føroyum. Hvaðani teir stava veit eingin við vissu, men helst er tað úr Noregi. Stólavangarnir eru 16 í tali. Harumframt vórðu ein lesipultur og eitt altarrúm tikin úr kirkjuni í Kirkjubø í 1874, tá kirkjan varð umvæld. Lutirnir vórðu settir í Tinghúsið har teir stóðu til árið eftir, tá teir vórðu fluttir til Danmarkar.

- Tað hendi uttan at føroyingar á nakran hátt settu seg ímóti tí. Tað var ikki tann stóri áhugin fyri lutunum, vil Arne Thorsteinsson vera við. Hann vil tó ikki meta um hvørt umstøður vóru at goyma hesar forngripir í Føroyum í 1875 og um lutirnir høvdu verið í sama standi nú, vórðu teir verandi í Føroyum.

Tað var í 1961, at danir góvu tilsøgn um at Kirjubøstólarnir og hinir føroysku forngripirnir kundu sendast aftur til Føroya, treytað av at umstøður vóru til at hýsa teimum.

Hesar umstøður hava vantað til fyri fáum árum síðan, tá Fornminnissavnið fekk hølini í Brekkutúni, har átta av teimum sekstan Kirkjubøstólunum og umleið helvtin av hinum umleið 400 føroysku forngripunum, ið hava verið í Danmark í útlegd, nú standa. Hin helvtin kemur við Bliki seinni.

Á ólavsøku verða allir teir nýliga heimkomnu forngripirnir sýndir fram. Síðan verða summir teirra pakkaðir niður aftur og goymdir, meðan aðrir gerast partur av førstu framsýningini hjá Fornminnissavninum.



*Bilurin við forngripafyltu byngjuni koyrdi framvið húsunum hjá Forngripasavninum í gomlu Hoyvíkini og niðan í meira rúmligu hølini í Brekkutúni*



*Trækisturnar vórðu beinanvegin bornar úr byngjuni inn í goymsluhølið*